# Leikur og ljóð í miðbýnum

**Í gjár gingu luttakararnir á NEATA festivalinum skrúðgongu úr Læraraskúlanum oman í miðbýin. Málið var Speakers Corner, har tey settu sín dám á býin við horntónleiki, ballónum og framførslum.**

NEATA FESTIVALUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



Har vóru bæði trøll og klovnar, og eini hundrað leikarar. Nakrir av teimum gingu runt við stórum tyssum av ballónum, og GHM syrgdi fyri horntónleiki.

Tá tey komu oman í miðbýin, steðgaðu tey í Speakers Corner, har tey stillaðu seg rundanum og framførslurnar byrjaðu í miðjuni. Íslendsku luttakararnir sungu.

Úr Lettlandi dansaðu nakrir menn og sungu afturvið. Eftir eina løtu vórunakriraváskoðarunum togaðir uppí dansin, meðan ein av lettunum spýði eld aftanfyri.

Úr Litava dansaðu tvey pør fólkadans og Estland framførdi ein lítlan leik við klarinetspæli afturvið.

Tiltakið endaði við at allir sjónleikararnir fingu eina ballón í hondina, føroyingar og útlendingar stillaðu seg saman, og øll sungu á føroyskum “Dukka mín er blá”. Tá fyrsta ørindi var liðugt, tóku tveir hornleikarar frá GHM yvir, meðan teir spældu, vórðu allar ballónirnar sleptar, og fóru til skýggja.





# Mot slaktevekt



Tveir menn sita í einum bíðirúmi. Teir eru báðir drápsmenn og bíða eftir revsing síni. Fyri at fáa tíðina at ganga telva teir - við bert einum talvfólki.



Leikurin “Mot slaktevekt” var framførdur í Sjónleikarhúsinum í gjár. Tað var norski bólkurin Hinsides Hekneby ið framførdi.

# Tveir luttakarar

Kamilla Ravnsfjall og Rakul Thomsen er báðar luttakarar á NEATA festivalinum. Tær eru við í leikinum “Hørpuríma” hjá Havnar Sjónleikarfelagi. Rakul sum sjónleikari og Kamilla sum tónleikari

**Rakul Thomsen, 18 ár**

Hevur tú verið á NEATA festivali fyrr?
– Ja, eg var við í Estlandi fyri fýra árum síðani.
Hví vilt tú vera við til festivalin?
– Tí eg havi spælt sjónleik í 7 ár og eg elski tað. Á festivalinum læra vit nógv frá hinum londunum og av teirra mentan. Tað er spennandi at síggja hini spæla, og eg vóni at kunna fáa íblástur og kunna brúka nøkur av teirra hugskotum. Festivalurin er eisini ein góður møguleiki at fáa nýggjar vinir.

**Kamilla Ravnsfjall, 17 ár**

Hevur tú verið á NEATA festivali fyrr?
– Nei, eg hevði ongantíð hoyrt um hann fyrr enn nú.
Hví vilt tú vera við til festivalin?
– Eg bleiv spurd, um eg hevði hug at koma við sum tónleikari, og tað hevði eg beinanvegin hug til. Mær dámar væl at hava møguleika fyri, at síggja onnur spæla og at møta fólki.



*Kamilla Ravnsfjall*



*Rakul Thomsen*